Jørn Astrup Hansen formaður í Búskaparráðnum:

# Glaður um at koma ”heimaftur”

**– Hetta er sum at koma heimaftur. Eg gleði meg til at fara undir arbeiðið. Tað eru greiðu orðini hjá Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi bankastjóra, nú landsstýrið hevur valt hann í Búskaparráðið og hann entá er vorðin formaður**


*Jørn Astrup Hansen heldur ikki, at tað er nakar vansi, at ein dani, sum býr í Danmark, er valdur til formann í Búskaparráðnum*

BÚSKAPARRÁÐ

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nýggja Búskaparrráðið hevði sín fyrsta fund í Havn hósdagin, tá tað skipaði seg við Jørn Astrup Hansen sum formanni. Vit hittu hann eftir fundin og spurdu, hvussu tað kenst at hava fingið slíkan álitispost.

Astrup er sera fegin um at hava fingið áheitan um at gerast limur í ráðnum, tí tað gevur honum møguleika at koma heim til Føroya av og á og at kunna fylgja við í føroyskum viðurskiftum. Hann sær ikki nakran trupulleika í tí, at hann er dani og býr í Danmark.

Uppá fyrispurning um tað ikki kann vera ein vansi fyri starv sítt í Búskaparráðnum, at hann býr uttan fyri Føroyar sigur Jørn Astrup, at hetta nýtist ikki at vera so. –Eg havi arbeitt leingi og búð her leingi her, so mín kunnleiki til hetta samfelagið er stórur. Hann vísir annars á, at allir hinir limirnir eru føroyingar ella partur av samfelagnum her, so hansara uppgáva sum formaður verður meira at samskipa, evaluera og syrgja fyri, at man raðfestir rætt. Jørn Astrup vísir á, at talan er ikki um ein ”enmandshær” sum hann málber seg.

### Fleiri fyrimunir

Hann heldur annars sjálvur, at tað kann vera ein stórur fyrimunur fyri Búskaparráðið, at hann hevur verið bankastjóri í góð 12 ár, og entá í eini hendingarríkari tíð bæði so og so. Tað hevur givið honum eitt gott innlit í føroysk viðurskifti, og hann heldur seg hava verið her nóg leingi til at síggja, at tingini útvikla seg ymiskt.

Uppá fyrispurning um hansara føroyska bankafortíð ikki kann vera ein ampi fyri hann, nú hann skal til at ráðgeva myndugleikunum sigur Jørn Astrup Hansen, at hann er ikki heftur á nakran hátt ella inhabilur, tí hann er ikki í bankanum longur. - Eg komi í Búskaparráðið við eini vitan, sum vónandi kann brúkast til nakað skilagott.

*– Tú hevur altíð verið kontantur í tínum úttalilsum og ikki bangin fyri at siga tína hugsan?*

– Tað fari eg at halda fram við.

*– Hvønn týdning heldur tú ráðgeving frá einum búskaparráð hevur?*

– Eg havi lagt til merkis, at báðir undanfarnu formenninir hava sagt, at stovnurin eigur at vera niðurlagdur. Tað er helst partur av tí frustratión, sum av og á er at finna í starvinum, eitt nú tí at orka hevur manglað. Eg vóni ikki, at eg veri partur av eini slíkari frustratión og støðu, tí eg haldi sjálvur, at tørvurin á einum slíkum ráðgevandi útvalgi er stórt. Eg haldi, at tørvurin, líka síðani at gamla ráðgevandi nevndin varð slep, á eini meting av føroyskum viðurskiftum hevur verið stórur. Avgerandi spurningurin er at seta neyðuga orkuna av til hetta týdningarmikla arbeiðið.

### Havi harða húð

Jørn Astrup sigur seg vóna, at onkur kann brúka teirra ráðgeving. – Eg sigi ikki, at man skal fylgja tí men man skal kunna fyrihalda seg til hesa ráðgeving. Og hann leggur aftrat: – Eg havi harða húð, skuldi onkur komið eftir mær.

Uppá fyrispurning hvat hann heldur um støðuna í føroyska samfelagnum og búskapinum í løtuni sigur Jørn Astrup, at hann nú fer at kunna seg um støðuna og fylgja gongdini. Hann ynskir tí ikki í verandi løtu at gera nakrar forhastaðar niðurstøðu men viðgongur, at tað er eitt ávíst slag av bjartskygni og ávísari uppdrift í Føroyum í løtuni og her ikki minst viðvíkjandi forbrúkinum og sigur seg vera eitt sindur kløkkan av tí oftani euforiska stemningi, sum tú møtir nógva staðni í Føroyum í dag.

Hann sigur seg tó ikki kenna aktuellu støðuna í búskapinum til fulnar men staðfestir, at tað búskaparliga hevur gingið væl seinastu mánaðirnar, hóast hann ikki kennir orsøkina til tess.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 9 2006

# Væntandi fleiri rentuhækkingar frá ECB

MARKNAÐARRÁK

Evropiski miðbankin, ECB, hækkaði rentuna við 0,25%-stigum til 2,50% hósdagin. Danski tjóðbankin hækkaði samstundis sína rentu til 2,75%. Stutta rentan í Evropa var 2,00% frá juni ’04 til desember ’05. Tað eru betraði útlit fyri evropiska búskapinum, umframt at prísvøksturin er í ovara lagi, sum elva til rentuhækkingar. Evropiski búskapurin hevur havt framgongd síðan síðsta summar. Búskaparvøksturin í 4. ársfj. 2005 var 1,7% hægri enn árið fyri. Ídnaðarframleiðslan økist í hvørjum, og sjálvt arbeiðsloysið lækkar eitt sindur. ECB hevur sum stavnhald, at prísvøksturin skal liggja um 2% um árið. Alt hetta seinasta árið hevur hann verið omanfyri 2%, og í februar vóru prísirnir 2,4% hægri enn fyri ári síðan. Formaðurin fyri ECB, Trichet, vísti á tíðindafundi á, at ECB hevur hækkað sínar metingar um búskapar- og prísvøkstur í ’06 og ’07. Hetta bendir á, at tað fara at koma fleiri rentuhækkingar frá ECB. Marknaðurin hevur innroknað tvær rentuhækkingar á 0,25%-stig aftrat í ár.

### Lánsbrævarentur hækkaðu eisini

Endiliga hendi okkurt við lánsbrævarentunum. Allan februar mánað sveiggjaði danska 10-ára rentan bert millum 3,45%-3,55%. Í farnu viku hækkaði hon til 3,62%. Um hon verður omanfyri hetta stig hesa vikuna, eru útlit fyri hægri rentum komandi vikurnar.

### Pan Fish hækkaði 33%

Vaksandi ørkymlan vegna fuglakrím hevur økt um væntaða eftirspurningin eftir fiskaúrdráttum. Hetta fekk Pan Fish at hækka uppaftur meira í farnu viku. Pan Fish er nú hækkað yvir 60% seinastu tvær vikurnar. Kaupthing metir kursin at vera ov høgan og mælir tí íleggjarum til at minka sín ognarlut í fyritøkuni.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verða høvuðstíðindini amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, sum verður kunngjørd fríggjadagin. Marknaðurin fer væntandi serliga at hyggja at, um nakað bendir á hægri lønarvøkstur ella annað, sum kann stuðla undir fleiri rentuhækkingum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 619,58 | -1,4% | ↓ |
| JPY | 5,32 | -1,0% | ↓ |
| GBP | 1.087,68 | -0,8% | ↓ |
| NOK | 93,33 | 0,7% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 102,24 | -0,3% | ↓ |
| Evru lánsbrøv | 171,02 | -0,4% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 115,41 | 0,5% | ↑ |
| Altjóða vøkstur | 74,42 | -0,5% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*